**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Svartkalvi. Túrur nr. 1328.**
**Tíðarskeið: 12 - 19/6 – 2013.**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund (til 16. juni), Regin Kristiansen, Mourits Mohr Joensen og Lise H. Ofstad.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Illicium varð tikið av havtasku.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Thyborøn-lemmar. Trolað varð vanliga í 4-6 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini mikudagin 12/6 kl. 18 og byrjaðu at royna í landsynningskantinum á føroyska landgrunninum, har vit royndu til fríggjadagin, tá vit fóru norðureftir í norðara kant. Kanningarleiðarin varð sigldur í land sunnudagin, og eftir tað varð roynt í eystara kanti á landgrunninum. Vórðu á Havnini eftir loknan túr mikudagin kl. 05 og landaðu á Bacalao. Tilsamans 18 hál vórðu góðkend og gjørd upp. Veðrið var gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 9. august 2013.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl at fáa av svartkalva, nærum líka nógv (93%), sum í fjør (Talva 1), sum var eitt gott ár. Eitt sindur minni varð at fáa av trantkongafiski. Eins og í fjør fingu vit ein gýtandi svartkalva, hesaferð í eystara kanti á landgrunninum. Fleiri magar vórðu kannaðir, og onkur svartkalvi át makrel.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 1328.

| FISKASLAG | 2013 18 hál KG | Nytrur | Magar | 2012 31 hál KG | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 15661.46 | 435 | 55 | 28855.23 | 0.93 |
| TRANTKONGAFISKUR | 4198.96 | | | 8698.48 | 0.83 |
| TINDASKØTA | 2073.38 | | | 2045.97 | 1.75 |
| BROSMA | 386.37 | 207 | 23 | 1126.10 | 0.59 |
| HALAHVASSA SKØTA | 244.01 | | | 669.59 | 0.63 |
| BLÁLONGA | 216.52 | 56 | 1 | 551.42 | 0.68 |
| BLÁGÓMUR | 199.73 | | | 758.47 | 0.45 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 139.20 | | | 3932.14 | 0.06 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 126.97 | | | 403.58 | 0.54 |
| SVARTKJAFTUR | 111.40 | | | 174.07 | 1.10 |
| HVÍTASKØTA | 81.83 | | | 196.09 | 0.72 |
| UPSI | 76.89 | 7 | | 952.54 | 0.14 |
| TOSKUR | 47.10 | 10 | 4 | 15.31 | 5.30 |
| LÁLLA | 44.94 | | | 83.25 | 0.93 |
| KLINGRUSKØTA | 29.28 | | | 25.02 | 2.02 |
| LIRI | 28.63 | | | 103.28 | 0.48 |
| LONGA | 25.34 | 7 | | 198.32 | 0.22 |
| GULLLAKSUR | 13.27 | | | 113.85 | 0.20 |
| HVASSASPREK | 10.50 | | | 11.90 | 1.52 |
| ÍSHAVSKRUTT | 1.79 | | | 0.00 | |
| ÚLVFISKUR | 1.30 | | | 11.53 | 0.19 |
| LÍTLI KRYTTLINGUR | 1.08 | | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 23719.91 | 722 | 83 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í dokumentinum Tur1328d.doc.

Petur Steingrund